## Avgjaldið hækkar

Atlantsflog boðar frá í tíðindaskrivi, at avgjaldið á flogferðaseðlunum hækkar frá 18, juni at rokna. Avgjaldið hækkar úr 120 upp í 150 krónur á øllum ferðaseðlum, sum verða bílagdir frá nevnda dagi at rokna. Hetta merkir so, at ein retur ferðaseðil hækkar við 60 krónum tilsamans, og svarar hetta til eina hækking á 4% fyri bíligasta ferðaseðilin.



## Ruth koppað í dokk

Føroyska nótaskipið Ruth koppaði í eini turrdokk í Århus havn í morgun. Skipasmiðjumenninir fingu ein rættiligan skelk, tá Ruth knappliga koppaði, meðan teir arbeiddu upp á hana. Ruth stóð í einari av teimum trimum turrdokkunum hjá Århus Shipyard, tá hon knappliga koppaði um hálvgum tíggjutíðina danska tíð í morgun. Farið var beinenvegin undir at fylla sjógv í dokkina, fyri at fáa rættað skipið uppaftur. Gullak Madsen úr Kvívík átti Ruth, men seldi herfyri ein stóran part til aðrar.

# Nýggjar skúlastovur fyri Gamla Realskúlan

**Í dag fer býráðið í Havn at taka støðu til keyp av fýra skúlastovum til at loysa fyribilstørvin, nú Gamli Realskúlin í Havn er stongdur**

SKÚLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Síðan 12. mars hevur sum kunnugt eingin skúlagongd verið í Gamla Realskúlanum í Havn. Hetta er skúlin, sum hýsti miðdeildini í Tórshavnar Kommunuskúla.

Á fundi í dag, sum byrjar klokkan 15, fer býráðið ætlandi at taka støðu til keyp av fýra skúlastovum.

Hetta er liður í eini ætlan um, hvussu hølistrupulleikarnir skulu loysast komandi skúla ár, nú Gamli Realskúlin ikki fer at verða brúktur til undirvísing aftur.

Tað eru trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin hjá Tórshavnar Kommunu, sum mæla býráðnum til at keypa.

### 2,5 miljónir

Í skrivinum, sum fyriliggur til fundin í dag, verður víst á, at Gamli Realskúlin er stongdur vegna vantandi brunatrygd og grundleggjandi vánaligar umstøður við eitt nú ongum wc.

Mett verður, at kommunan kann keypa fýra undirvísingarhøli – ella skúlastovur – fyri 2,5 miljónir krónur og innbúgv fyri 260.000 krónur.

Mælt verður til, at býráðið játtar 2,760 miljónir krónur til keypið.

### Heildarætlan

Ætlanin er annars at gera eina heildarætlan fyri Tórshavnar Kommunuskúla, sum skal gjøgnumførast komandi árini, so hølistrupulleikarnir verða loystir.

Hetta arbeiði byrjar ætlandi í heyst.

Á tíðindafundi, sum borgarstjórin, Heðin Mortensen, kallaði til í morgun, skiltist, at ætlanin er at seta nýggju skúlastovurnar upp í skúlagarðinum – ella so tætt uppat skúlanum sum gjørligt.



*Á fundi í dag, sum byrjar klokkan 15, fer býráðið í Havn at viðgera spurningin um keyp av fýra fyribils skúlastovum, nú Gamli Realskúlin ikki verður latin uppaftur til skúlagongd*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



***Harmonikukonsert við børnum:*** *Børn og harmonikur er kanska ikki so vanligt at síggja, men í gjár høvdu hesi fittu børnini, sum ganga á Tórshavnar Musikkskúla, konsert á Musikkskúlanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin